# Útnorðursamstarvið útbygt

TÍÐINDASKRIV

Landsstýrið, íslendska stjórnin, grønlendska landsstýrið og Útnorðurráðið hava gjørt samstarvsyvirlýsing.

Yvirlýsingin varð undirskrivað í sambandi við ráðstevnuna hjá Norðurlandaráðnum um demokrati, sum í hesum døgum er í Reykjavík.

Samstarvsyvirlýsingin er eitt týdningarmikið stig fram móti at fáa samstarvið millum ráðið og myndugleikarnar í teimum trimum londunum í tryggar formligar karmar.

Tað vóru norðurlendsku samstarvsráðharrarnir, sum skrivaðu undir yvirlýsingina, Siv Friðleifsdóttir vegna Ísland, Lise Lennert vegna Grønland, og Høgni Hoydal vegna Føroyar, meðan Hjálmar Árnason, sum er formaður í Útnorðurráðnum, skrivaði undir vegna Útnorðurráðið. Næstformaðurin í Útnorðurráðnum, Jógvan Durhuus, tók somuleiðis lut í hátíðarhaldinum.

Samstarvsyvirlýsingin staðfestir millum annað, at samstarvið millum íslendsku stjórnina, føroyska og grønlendska landsstýrið og Útnorðurráðið skal verða framt við at partanir skifta upplýsingar sínámillum á árligum fundi í sambandi við tingsetu Norðurlandaráðsins.

Eisini skulu norðurlendsku samstarvsráðharrarnir, í tann mun tað ber til, taka lut í ársfundinum hjá Útnorðurráðnum, og avvarðandi ráðharrar og landsstýrismenn skulu somuleiðis taka lut í evnisráðstevnunum hjá Ráðnum.

Harumframt skulu norðurlendsku samsstarvsráðharrarnir hvørt ár lata Ráðnum frágreiðing um, hvat londini hava gjørt í mun til tilmælini hjá Ráðnum, og um samstarvið landanna millum.

Tingmannaráð Útnorðurs er samstarvsráðið hjá Føroya Løgtingi, grønlendska Landstinginum, og íslendska Altinginum. Tað varð stovnað í Nuuk í Grønlandi í 1985.

Á aðalfundi í 1997 broytti ráðið navn til Útnorðurráðið.

Átjan tingmenn, 6 úr hvørjum landi, sita í ráðnum.

Útnorðurráðið hevur gjørt samtyktir um ymisk mál, so sum umhvørvis- og tilfeingismál, styrkt mentannarligt samstarv landanna millum, skúla- og ítróttarsamvinnu og mangt annað.

Samtyktir Útnorðurráðsins verða lagdar fram sum uppskot til samtyktar á Løgtingi.








Lesið Sosialurin -tað loysir seg







VALGREINAR

# Virðiligan aldurdóm til øll takk

**Kaj Leo Johannesen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Sum útgangstøði so snúgva viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum seg um at geva fólki virðilig kor at virka undir, meðan tey eru í arbeiðsførum aldri, og somuleiðis virðilig kor, eftir tey eru liðug at arbeiða.

Spurningurin er bara hvussu hendan køkan skal býtast, hvussu nógv skal arbeiðsfólkið sjálvt gjalda, og hvussu nógv skal arbeiðsgevarin gjalda, tí eg havi eina greiða meining um at báðir partar í veruleikanum hava sama málsetning.

Størsti týdningurin er keypiorkan í landinum, meðalkeypiorkan er minkað við uml 11 % og er hetta av stórum týdningi, so vit skulu hava eina prístalsregulering, neyðsynjavørir og ger upp yvir tíðarskeiðir fyri at síggja prísútviklingin á hesum vørum.

Hví skal eitt arbeiðsfólk sum arbeiðir á flakavirki ikki hava eina virðiliga eftirløn, tá tey røkka pensiónsaldur.

Innan fíggjarheimin í Føroyum tildømis, er ein vanlig eftirlønarskipan nærum líka sjálvsøgd í dag, sum at fáa vanligu mánaðarlønina útgoldna, har er bert ein spurningur um hvørja eftirlønarskipan tú sjálvur sum arbeiðstakari velur.

Møguleikarnir eru fylgjandi í løtuni.

Eftirlønarskipan við Lív har talan er um Kapitalpensión,Trygging við óarbeiðsføri, og trygging av eftirkomarum, við deyða arbeiðstakarans.

Innan Peningastovnar hava vit Kapitalpensión og Lutapensión, eftir at lóggávan er broytt, kann eg sum arbeiðstakari velja, at seta mína pensión í altjóða skrásettar fyritøkir.

Vanligt er at Arbeiðsgevarin betalir tildømis millum 10 % og arbeiðstakarin 5 % og síðani kunnu hesi 5 prosentini dragast frá í skattinum, Tá so peningurin verður útafturgoldin við pensiónsaldur verður upphæddin bert skattað við 35 %.

Um vit skulu tosað um hækking í reallønarinntøku, haldi eg tað verða rættast at lækka skattin.

Sum vit síggjað og hoyra og merkja, so proklamera politisku flokkarnir at skatturin floymir inn í Landskassan, tað er heldur ikki undarligt, eftirsum ein ófaglærdur arbeiðstakari arbeiðir frá Mánadegi til Hósdag aftaná døgurða, fyri skattir og avgjøld,

Hevði tað verði umvent, so høvdu ófaglærd eisini havt ráð at liva, sum onnur í hesum samfelagnum.

Vit mugu arbeiða fram ímóti, at allir arbeiðsgevarir kunnu bjóða øllum arbeiðstakarum ein góðan pensiónsorðning, tí í longdini kemur tað ikkia at verða góðtikið at ein partur av arbeiðsmarknaðinum ikki hevur mannsømilig kor at virka undir.

Lat okkum virða rættin hjá fagfeløgum at samráðast og streika, uttan at senda boð eftir løgregluni.

# Avtakið blokkpolitikkin

**Roar Heini Olsen**
*Valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoy*



Frá valfundum og valgreinum fæst prógv fyri, at Føroyar eftir valið gerast eitt satt smørhol at liva í. Øll eru so sera samd um, at bústaðarviðurskiftini hjá yngri sum eldri, støkum, láginntøkufamiljum og sálarliga sjúkum verða loyst, tørvurin á eldrasambýlum og ellis- og røktarheimum verður nøktaður, sjúkrahúsini og heilsuverkið fáa munandi batar, osfr., osfr… Tú fert at ivast í, um tað er so stórur skaði, at Sjálvstýrisflokkurin møguliga ikki fær umboðan á tingi eftir valið, tí - taka vit ikki ríkisrættarligu støðuna við, eru øll valevnini so sera samd um at seta fólkið fremst.

Men so kemur mær til hugs, at nógv av lyftunum eru tey somu, sum eg hoyrdi heilt aftur í 70´árini, tá mítt fedrana upphav slapp sær burturúr býraðspolitikk, m.a. tí vallyftini eftir valið blivu avloyst av blokkpolitikki, har lítið skilagott kom burturúr, tí samgonga og andstøða ómøguligt kundu taka undir við annars mangan sera góðum uppskotum frá hinum partinum. Sama tóktist vera galdandi í tinginum. Hetta er ein meginorsøk til, at eg higartil havi hildið meg frá politikki. Ein onnur orsøk er tann evindarligi lokalpolitikkurin, har skitnir handlar verða gjørdir, tí flokkarnir ikki tora at standa við teimum raðfestingum, sum teir áðrenn valið søgdu seg hava; tora ikki at fremja ávísar neyðugar íløgur og at útseta aðrar, sum eru minni týðandi og tora ikki heilt at nokta fyri íløgum, ið stríða ímóti allari sunnari fornuft og góðum samfelagsbúskapi.

Ætlaða ferjulegan í Vági er gott dømi um hetta. Hetta er lokalpolitikkur, tá hann er ringastur og vísir, í hvussu stóran mun lokalpolitikkur kann avbrongla flokkarnar og teirra politikk. Sum landspolitikkari eigur tú at fremja loysnir, sum bæði tæna heildini og lokaløkjunum best. Niðurundirkomin økir av landinum og veikir medborgarar skulu avgjørt ikki gloymast, men tá fíggjarorkan er avmarkað og nógvar átroðkandi samfelagsútbyggingar liggja á láni mátti borið til at funnið okkurt meira konstruktivt enn hesa dupultíløgu.

Ikki vænti eg, at nógvir suðuroyingar halda, at oyggin er sum føðingardagsbarnið, ið hevur alt, so gestirnir ikki rættuliga vita hvat teir skulu keypa í føðingardagsgávu og keypa so bara okkurt, sum kanska kann býtast um, skoytir føðingardagsbarnið ikki um gávuna. Nei, góðu menn og kvinnur, sum verða vald inn á ting, latið nýggju suðuroyarferjuna leggja at á einum stað í oynni, leggið slík ørvitisprojekt til viks, gevið suðuroyingum so sama posa av peningi og vitið, um teir ikki velja heldur at brúka peningin til aðrar samferðsluútbyggingar í oynni, t.d. vegakervið í síni heild og berghol millum Øravík og Hov.

Onkur flokkur sigur seg vilja gera kontrakt við veljararnar um, at hann hesaferð skal royna at halda síni vallyfti. Nei vælsignaðir, hetta er sum tá býráðið í Havn á sinni atkvøddi um, hvørt tað skuldi taka seg sjálvt fyri fult. Tað man mangan hava staðið illa til við tí, um tað hesuferð er neyðugt at gera sáttmála um nakað, sum fyri okkum onnur er ein sjálvfylgja.

Nú tað tykist ivasamt, um umboð fyri Sjálvstýrisflokkin yvirhøvur kemur inn á ting, vil eg inniliga heita á hini valevnini um at standa við teirra vallyftir fyri at endurreisa trúvirðið hjá flokkunum, virðingina fyri politisku skipanini og útinna tað, sum er okkara fremsta uppgáva, at loysa týðandi samfelagsmál borgarunum at gagni. Umframt at veljarin sjálvsagt skal kunna líta á tað, sum verður ført fram sum valagn, kundi eg hugsa mær at gjørt sáttmála við flest møgulig av hinum valevnunum um, at vit aftaná valið leggja blokkpolitikkin millum samgongu og andstøðu til viks, og heldur enn at leggja fót fyri góðum uppskotum frá mótpartinum taka hesi til viðgerðar og fáa tey tillagað soleiðis, at ein meiriluti kann taka undir við teimum.

Ein ávís innanhýsis samgongu- og flokksdisciplin kann - serliga uppundir val - vera neyðug, júst fyri at forða fyri, at seráhugamál og lokalpatriotisma ikki útarta seg til lokalidioti, men eigur ikki at forða fyri, at vit í felag finna fram til loysnir, sum gagna borgarunum og heildini best.

Eg skal við hesum heita á veljararnar um at seta kross við tey valevni - óansað flokk - sum saman við mær siga seg vilja avtaka blokkpolitikkin og í staðin samla hugflog og megi úr øllum flokkum fyri at loysa átroðkandi samfelagsspurningar, heldur enn at leggja fót fyri hvønn annan komandi 4 árini.

Brúkið høvdið, veljið við hjartanum!

# Fólksins ognir aftur til fólkið



**Jóannes Eidesgaard**
*formaður Javnaðarfloksins*

Flestu okkara eru samd um, at tá tað so vakurt verður sagt, at eitt tilfeingi er fólksins ogn, so hugsa vit bókstaviliga eisini, at hesar hoyra fólkinum til. Men samstundis mugu vit so eisini staðfesta, at so er ikki í rættiliga nógvum førum. Vit siga t.d., at fiskiríkidømið rundan um okkara oyggjar, tað eiga vit øll. Men á hvønn hátt kemur hesin ognarrættur til sjóndar? Kenna vit ikki øll mong dømi um tað beint øvugta, at ávísir persónar kunnu gera sær dælt av somu fólksins ognum? Og hvussu verður við ráevnunum í undirgrundini, fara tey eisini at verða ogn hjá privatum feløgum, ella fara vit at umsita tey, sum veruliga fólksins ognir? Livst so spyrst!

Lógin um vinnuligan fiskiskap er vorðin ein lógarfrumskóg av tí aðru verð. Vit siga tann eina dagin, at fiskurin er fólksins ogn fyri dagin eftir at venda blinda eygað til, at veiðiloyvi og fiskidagar verða seldir, har vinningurin fer beinleiðis í lumman hjá tí, sum einaferð hevur fingið somu rættindi fyri einki frá landsstýrinum. Hetta ber ikki til. Hetta er ikki politiskt borðbart.

Tí mugu vit antin lata høgrarákið ráða, soleiðis sum nakrir flokkar ynskja,og síðan laga lógina hareftir. Men tað ber framvegis illa til yvir fólki at forsvara, at rættindi, sum verða latin fyri einki, kunna gera tann, sum hevur fingið hesi rættindi, til millióning. Men hetta er góður borgarligur politikkur.

Hin loysnin, nevniliga tann, sum Javnaðarflokkurin stendur fyri, er at vit staðfesta, at ognarrætturin til hesi rættindi er fólksins, og at tað er tað almenna, sum umsitur henda ognarrættin. T.v.s. at rættindi verða latin teimum, sum kunnu gera brúk av teimum, men at hesin rættur verður bert latin og kann ongantíð seljast øðrum. V.ø.o. taka vit alla usmetligheit burtur millum skipaeigarar, men leggja almenna bindiliðið ímillum. Um hetta bindilið skal eita fiskidagabanki ella okkurt heilt annað, kunnu vit væl ivaleyst finna semju um.

Hetta vil merkja, at veiðiloyvi ikki longur fær ávirkan á søluprísin, tá skip verða seld. Hugsa bert um, hvørjar trupulleikar ungir virkisfísnir menn hava fyri at sleppa inn í fiskivinnuna. Teir mugu sum er gjalda ein yvirprís, sum mangan er eins høgur sum virði á skipinum. Men henda yvirprís fáa teir sjáldan fíggja, tí peningastovnarnir fáa ikki veð í veiðiloyvinum.

Halda vit áfram við verandi fólkafloksgongd, so mugu vit eisinin innstilla okkum uppá, at veiðiloyvini enda á fáum kapitalsterkum hondum, sum í flestu førum búgva í miðstaðarøkinum.

Men her má nakað gerast her og nú. Bíða vit eitt valskeið aftrat, so vendst ikki aftur. Vit hava møguleikan nú at gera hesi virði til fólksins ogn, men um fýra ár verður tað ognin hjá nøkrum fáum.